# Yvirlitstroling - Landgrunnur

**Magnus Heinason, túrur nr. 2110**

**Tíðarskeið: 03/3-15/3 2021**

**Ábyrgd:** Helga Bára Mohr Vang



**Endamál:** *Høvuðsendamálið við túrinum er at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið verða veidd.*
*Harafturat var samtrolað við Jákup Sverra fyri at kunna samanlíkna fiskievnini hjá tí gamla og tí nýggja rannsóknarskipinum.*

---

## Samandráttur


Hetta var tann seinni túrurin í ár av yvirlitstrolingunum á vári á føroyska landgrunninum. 47 støðir vórðu tiknar og harav vórðu 45 góðkendar. Tískil eru allar 100 støðirnar tiknar tilsamans á túri 2108 og 2110. Harafturat bleiv samtrolað við Jákup Sverra 56 støðir. 45 ymisk fiskasløg vórðu skrásett á túr 2110. Hýsan var framvegis at fáa í stórum nøgdum, tó tað var nakað minni enn í fjør. Nøgdin av upsa var eisini størri enn hevur verið vanligt seinastu árini. Hinvegin var lítið at fáa av toski. (sí mynd 2). Nakað sum var heldur óvanligt var, at lodna var fingin á 13 støðum innarliga á Landgrunninum (sí mynd 1) og tað var rættiliga vanlig at finna lodnu í fiskamagum, serliga hjá toski.




*Mynd 1. Reyður ringur er runt um tær støðir har lodna (Mallotus villosus) var fingin í trolið.*

### Um túrin

Vit fóru av Havnini hóskvøldið 04/03 kl. 21. Vit byrjaðu eystan fyri Munkagrunnin og hildu fram suður á Munkagrunnin. Jákup Sverri var ikki við fyrsta dagin men kom út á Munkagrunnin leygardagin 6/3 og vit samtrolaðu 6 støðir suðuri á Munkagrunninum. Sunnudagin gekk leiðin í Sandshavið, har 6 støðir blivu samtrolaðar.
Mánadagin mátti Jákup Sverri inn á Havnina aftur, men vit hildu fram út í móti Rygginum og Mýlingsgrunninum. Týsdagin 9/3 var Jákup Sverri aftur við okkum, men tíverri bleiv veðrið keðiligt út á seinnapartin so avgjørt var at halda inn á Havnina at landa og eisini manglaði ein eykalutur.
Vit fóru avstað aftur, saman við Jákup Sverra, mikukvøldið 10/3 kl. 21 og byrjaðu hósmorgunin 11/3 sunnan fyri Mykines. Veðrið hesa næstu vikuna var eitt sindur avbjóðandi, men vit fingu tikið millum 4 og 6 støðir hvønn dag. Mánadagin bleiv síðsta støðin tikin á Munkagrunninum og vit vóru á Havnini aftur mánakvøldið kl. 19.

### Prøvatøka

Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Búningarstigini til botnfisk (bústig 1-7, talva 4.4.1 í sýnishondbókini) vóru brúkt fyri øll fiskasløg, undantikið gulllaks (bústig 1-7, egin), kongafisk (bústig 1-4, talva 4.4.3), langasporl (bústig 1-4, talva 4.4.5), havtasku (bústig 1-5, egin) og stinglaks (bústig 1-5, Gordon et al. 2000).

### Reiðskapur

116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinhamns lemmar. Breitlar 60 og 120 m. Starmon-mini og Starmon-TD temperaturmátarar, sum verða settir á trollemmarnar.

### Viðmerkingar

Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í imp-útskriftirnar og fylgiskjal.

### Fólk við frá Havstovuni

Helga Bára Mohr Vang (kanningarleiðari)
Jens Arni Thomassen, Marit Pedersen og Regin Kristiansen.




*Mynd 2: Myndin vísir nøgd (kg pr. tíma) av toski, hýsu og upsa í váryvirlitstrolingunum á Landgrunninum frá 1983 til 2021.*

*Talva 1. Veiða, nytrur, magar og tal av støðum pr. fiskaslag.*

| Túr 2108 og 2110 (100 støðir tilsamans) | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Slag | KG í alt | KG pr. tíma | Nytrur | Magar |
| Hýsa | 28408.7 | 284.09 | 808 | 325 |
| Upsi | 13862.7 | 138.63 | 808 | 191 |
| Toskur | 6326.0 | 63.26 | 804 | 280 |
| Gulllaksur | 2745.8 | 27.46 | 200 | |
| Lítli kongafiskur | 2098.2 | 20.98 | | |
| Longa | 1673.6 | 16.74 | 201 | 5 |
| Svartkjaftur | 1246.7 | 12.47 | 41 | |
| Hvitingur | 1184.0 | 11.84 | | |
| Hvítingsbróðir | 1117.7 | 11.18 | | |
| Reyðsprøka | 862.9 | 8.63 | 3 | 3 |
| Stóri kongafiskur | 589.4 | 5.89 | | |
| Tunga | 458.4 | 4.58 | | |
| Havmús | 345.2 | 3.45 | | |
| Blálonga | 343.4 | 3.43 | 52 | 10 |
| Knurrhani | 322.7 | 3.23 | | |
| Sandsprøka | 218.9 | 2.19 | | |
| Havtaska | 146.1 | 1.46 | | |
| Rognkelsi | 134.2 | 1.34 | | |
| Brosma | 118.8 | 1.19 | 66 | 1 |
| Búksvarti hávur | 104.1 | 1.04 | | |
| Loligo | 94.0 | 0.94 | | |
| Streymsild | 89.8 | 0.90 | | |
| Lýrur | 68.4 | 0.68 | | |
| Sild | 66.5 | 0.66 | | |
| Silvur murtur | 60.3 | 0.60 | | |
| Trantkongafiskur | 55.2 | 0.55 | | |
| Kjaftsvarti kongafiskur | 39.7 | 0.40 | | |
| Hvassasprek | 30.2 | 0.30 | | |
| Kalvi | 18.2 | 0.18 | | |
| Lálla | 18.0 | 0.18 | | |
| Tindaskøta | 16.8 | 0.17 | | |
| Agnhøgguslokkur | 15.4 | 0.15 | | |
| Steinbítur | 14.8 | 0.15 | | |
| Lítla brosma | 12.7 | 0.13 | | |
| Glaskvoysa | 8.5 | 0.09 | | |
| Blágómur | 7.8 | 0.08 | | |
| Glýsufiskur | 4.5 | 0.04 | | |
| Kjaftsvarti hávur | 1.9 | 0.02 | | |
| Lodna | 1.4 | 0.01 | | |
| Ulvfiskur | 1.2 | 0.01 | | |
| Mora | 1.1 | 0.01 | | |
| Nebbasild (øll) | 0.5 | 0.00 | | |
| Makrelur | 0.3 | 0.00 | | |
| Trýhyrnta hornabrosma | 0.2 | 0.00 | | |
| Kryttlingur | 0.0 | 0.00 | | |